Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord

Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Fólkatrygging – samhaldsfesti

Oddagrein

FYRI einum góðum ári síðani boðaði landsstýriskvinnan í almannamálum frá, at uppskot um eina nýggja eftirlønarskipan skuldi leggjast fram innan ikki so langa tíð.

HESUM boðaði Helena Dam á Neystabø frá í einum svari til fyrispurning frá Óla Breckmann. Sambært svarinum minti uppskotið so nógv um uppskot Fólkafloksins um eina »fólkatrygging«, at Óli Breckmann tók ímóti svarinum við lógvabrestum oman fyri skallan.

MEN uppskotið kom ikki tá. Uppskotið kom heldur ikki í seinastu tingsetu. Og ætlanin fær lítla umrøðu í ólavsøkurøðu løgmans. Tó verður sagt, at Almanna- og Heilsumálastýrið nú tingast við fakfeløgini um, hvussu tann nýggja individuella eftirlønarskipanin kann samskipast við tær skipanir, sum fakfeløgini hava í dag.

ONKI verður sagt um, hvussu tað prinsipiella grundarlagið er. Men umrøðan á tingi í seinastu viku bendi á, at tað framvegis verður arbeitt eftir tí leisti, sum fólkatrygging Fólkafloksins var skorin eftir.

TÁ henda ætlanin varð almannakunngjørd fyri hálvum øðrum ári síðani elvdi tað til mikið rok. Fleiri tjóðveldisfólk og tjóðveldisfeløg vendu sær frá ætlanini. Orsøkin var, at hon kvetti við tað samhaldsføstu skipan, sum Tjóðveldisflokkurin var við til at samtykkja í síni tíð. Ein skipan, sum Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og nú eisini Sjálvstýrisflokkurin hava virkað ímóti.

UMRØÐAN í fjølmiðlunum avdúkaði, at skipanin var ikki samhaldsføst og at hon var alt annað enn løtt at seta í verk. Men sjóforklæringin hjá nýggju tjóðveldisleiðsluni var, at fólkapensjónin skuldi gerast til samhaldsfastan fólkapensjónsgrunn – sum um fólkapensjónin ikki er samhaldsføst.

ÍSTAÐIN fyri eisini at ganga undir politikk Fólkafloksins á hesum øki, áttu Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin heldur at bøtt um ta samhaldsføstu skipan, sum grundarlag jú er lagt undir.

HENDA skipan gevur øllum somu eftirløn. Líka mikið, hvussu nógv er goldið inn. Mótvegis uppskoti Fólkafloksins, sum gevur teimum, sum hava forvunnið mest, størstu eftirlønina, meðan láglønarbólkar og pensjónsmóttakarar verða við sviðusoð,

Sosialurin

Fleiri grundøki í Havn

Bíðilistarnir til grundstykkir eru farnir at vaksa og tí er neyðugt hjá býráðnum at útvega fleiri grundstykkir

Bíðilistarnir til grundstykkir í høvuðsstaðnum eru farnir at vaksa, og tí fer býráðið í næstum at útvega sínum borgarum fleiri grundstykkir

STEFAN Í SKORINI

Býráðið í Havn hevur ein bústaðartrupulleika, av tí at alt fleiri fólk velja at flyta til miðstaðarøki, bæði av bygd og úr øðrum londum. Í løtuni hevur Tórshavnar Býráð ikki møguleika at útvega fólki, sum hava ynski um at byggja hús, eitt grundstykki.

- Havnin veksur so nógv í løtuni, at øll grundstykkini longu eru seld. Fyri nøkrum fáum árum síðani var eingin trupulleiki at ogna sær eitt grundstykki, og býráðið hevði útstykkjað nóg mikið. Hesi eru nú seld, og bíðilistin er bara vaksandi, sigur Heðin Mortensen formaður í byggi- og býarsamskipanarnevndini.

Fleiri grundstykki í Hoyvíkshaganum

Tey økini, sum býráðið hevði sett av til bústaðarøki, eru nú um at fyllast. Tí er neyðugt í nærmastu framtíð at útvega fleiri grundstykkir.

Á Hamrinum á Argjum er um at fyllast upp, og har hevur býráðið ikki ætlanir um at gera fleiri grundstykkir fyribils. Hinvegin er stórt øki í Hoyvíkshaganum, sum verður til taks at byggja hús á í næstum.

Á høgru síðu á Løgmannabreyt er eitt stórt tómt øki, sum verður útstykkjað. Hetta økið er niðanfyri tey nýggju raðhúsini, sum eru á Løgmannabreyt.

- Hetta økið er ætlað teimum, sum ikki hava hug at búgva í raðhúsum, men heldur vilja hava sítt egna sethús og sítt egna grundstykki, sigur Heðin Mortensen, so her verður ikki talan um raðhús.

- Hetta er tann lættasta og bíligasta loysnin, sum býráðið kann bjóða í løtuni, sigur Heðin Mortensen.

- Tað er eisini neyðugt, at aðrir hentleikar fylgja við, og at vøggustovur og barnagarðar verða løgd, har ungfólk koma til.

180 nýggjar íbúðir í Berjabrekku

Berjabrekka er sett av til raðhús burturav, og býráðið hevur longu samtykt, at eini 180 íbuðir skulu byggjast afturat á tí økinum. Tann ætlanin er nevnd Berjabrekka 3.

Tey nýggju raðhúsini skulu byggjast omanfyri tann varda verkstaðin Virkni, og tað er Høgni Mikkelsen, sum skal standa fyri arbeiðnum. Hann hevur eisini staðið fyri øðrum verkætlanum við raðhúsum í Havn.

Fleiri vinnuøki

Fyri at fólk, sum flyta til Havnar, skulu hava møguleikan at brúka sína útbúgving er eisini neyðugt at gera vinnuøki. Tí hevur býráðið sett øki av til vinnulívið.

Alt økið framvið Vegnum Langa frá barnagarðinum og til Løgmannabreyt er sett av til fyritøkur at byggja á, og fleiri fyritøkur eru longu kunnaðar um hetta. Ætlanin er eisini at leingja um vinnuøkið á Sandvíkahjalla.

Beint eftir summarfrítíðina verður eisini farið í gongd við at gera eina læknamiðstøð afturat í Gundadali við síðuna av læknamiðstøðini, sum júst er bygd.

Eitt sindur av grønum eisini

Inni í Havnini eru nøkur øki, sum enn eru óbygd, har møguleiki kundi verið fyri at bygt íbúðir ella aðrar bygningar. Høgrumegin R.Č. Effersøes Gøta yvirav SMS er eitt slíkt øki.

Heðin Mortensen sigur tó, at sjálvt um nøkur av hesum økjunum eru sett av til almennar bygningar, so hevur hetta býráðið ikki ætlanir um at byggja á hesum økjum, tí eisini skal pláss verða fyri grønum økjum í Havnini.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra kona, móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

BORGHILD JOENSEN
á Strondum
ættað av Stykkinum

andaðist á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík 7. august, 76 ára gomul.

Farið verður av Røktar- og Ellisheiminum hósdagin kl. 18.00. Gravarferðin verður úr Sjóvar kirkju fríggjadagin kl. 14.00.

Familjunnar vegna

Kristian

Tey, sum vilja minnast Borghild, kunnu lata Sjóvar kirkju eina gávu.

Ongantíð aftur

Hetta er seinasta ferðin, at internetsambandið hjá føroyingum fer at verða so vánaligt, sum tað gjørdist týsmorgunin, tá farið varð undir at umvæla Cantat kaðalin. Tað torir stjórin á Føroya Tele næstan at lova



	Hægst	Mi?al	í løtuni
Inn:	4502.8 kb/s	2712.6 kb/s	507.0 kb/s
Út:	4392.1 kb/s	657.5 kb/s	214.7 kb/s

Á myndini sæst internetferðslan millim Føroyar og meginlandið farnu vikuna. Týsmorgunin, tá farið varð undir at umvæla Cantat kaðalin, gjørdist kapasiteturin á linjuni til Danmarkar átta ferðir minni, og tí var netið so at siga ónýtiligt. Hetta hendir ikki aftur, sigur Føroya Tele

Mynd: www.olivant.fo

RÚNAR REISTRUP

Føroyingar liðu internetdeyðan týsmorgunin, og tað var ikki fyrstu ferð. Men fyri hvørja ferð tað hendir, rakar tað meinari enn fyrr, tí alsamt fleiri privatpersónar og serliga fyritøkur gerast óloysiliga heftar at netinum. Nógv av teimum mest vitjaðu støðunum á netinum so sum Sosialurin, Dimmalætting og leitiskipanin in.fo liggja á servarum uttanlands, og tí vórðu hesi lítið vitjað týsdagin og mikudagin, tá sambandið til útheimin koyrdi við sera lágari ferð.

Aðrar fyritøkur hava so at siga alt handilssamskifti við ávísar leverandørar ígjøgnum netið, og tí kann tað hava víttfevnandi fylgjur, um sambandið knappliga er mestsum deytt eins og tað var týsdagin og í gjár. Á Føroya Tele ásanna tey, at tað ikki longur ber til at slíta netsambandið við útheimin heilt, heldur ikki um talan bert er um ein dag ella tveir, og tí verða stig nú tikin at gera ein betri backup skipan, sum altíð er klár at taka við, um sambandið ígjøgnum Cantat kaðalin verður slitið aftur.

Cantat kaðalin er sjálv telelívæðrin millum Føroyar og meginlandið.

Átta ferðir minni

Føroya Tele hevur longu eina backup skipan við tað at ein ávísur kapasitetur á fylgissveini verður brúktur til internetsamskifti, tá kaðalsambandið er kvett.

Tað var hendan skipan sum tók við týsmorgunin, tá alt samband um Cantat kaðalin varð slitið.

Men sum flestu internetbrúkarar merktu, er kapasiteturin á skipanini so lítil, at tað mestsum ikki bar til at brúka internetið í gjár og týsdagin.

Kapasiteturin, ið er settur av til internetferðslu á fylgissveinasambandinum hjá Føroya Tele, er átta ferðir minni enn kapasiteturin á kaðalinum, sum í sær sjálvum er nakað lítil í mun til tann tørv, ið føroyskir internetbrúkarar hava.

Tí nyttar hendan backup skipan lítið og einki sum er. Men nú fer Føroya Tele at gera avtalu um at leiga ein størri part av fylgissveinakapasitetinum, og ætlanin við hesum er at tryggja, at internetsambandið millum Føroyar og meginlandið altíð kann koyra við rímiligari ferð, eisini um Cantat kaðalin skuldi farið aftur.

Hendir ikki aftur

Ætlanin er at leiga eitt 4 megabit samband á fylgissveininum, sum altíð skal vera tøkt til internetnýtslu. Hetta svarar til tann kapasitetin, sum vanliga er settur av til internetsamskifti á Cantat kaðalinum, so talan verður um eitt eins gott fylgissveinasamband og núverandi kaðalsambandið. Hesin kapasitetur skal so brúkast, um tað aftur hendir seg at kaðalsambandið verður slitið.

Stjórin á Føroya Tele, Andras Róin torir soleiðis næstan at lova, at tað ikki kemur fyri aftur, at føroyskir brúkarar fara at hava so vánaligt internetsamband, sum tað teir hava havt seinastu tveir dagarnar. Orsøkin til at lyftið við einum ávísum iva er, at internetferðslan úr Føroyum niður á meginlandið økist við øgiligari ferð.

So hóast dataflutningskapasiteturin um fylgissvein skjótt gerst áttafaldaður, so hjálpir tað einki, um ferðslan eisini er áttafaldað, næstu ferð Cantat kaðalin slitnar.

Men ætlanin er so, sigur Andras Róin, at internetsambandið ongantíð aftur skal gerast eins vánaligt og tað gjørdist týsmorgunin.

Bráðfeingis hjálp

Tað fer væntandi at taka minst eina viku at umvæla Cantat kaðalin, og tí roynir Føroya Tele longu nú at betra interetsambandið um fylgissvein fyribils, so tað aftur verður nýtiligt.

Í gjár arbeiddi televeitarin við at gera avtalu um at bráðfeingis leiga ein størri part av fylgissveinakapasitetinum, so hjálpast kundi um internetsambandið beinanvegin. Væntandi fór hetta at koma í lag longu í gjár soleiðis at dataflutningskapasiteturin um fylgissvein kundi vera umleið helvtina av tí, sum hann vanliga er um Cantat kaðalin.

Tá skuldi aftur borið til at brúkt internetið, tó við nakað minni ferð enn vanligt.

Annars er tað aftur vorðið eitt sindur trongligt hjá internetbrúkarum á Cantat kaðalinum, og tí fer Føroya Tele í næstum at leiga seg inn á ein størri part av hesum kaðali.

Ætlanin er, at í heyst skal kapasiteturin til internetnýtslu á Cantat kaðalinum økjast úr núverandi 4 megbittum upp í 8 ella kanska 12 megabit.

Sum er merkja internetbrúkarar at ferðin ikki altíð er sum hon átti at verið, men tann trupulleikin átti at verið loystur fyribils við økta kapasitetinum á kaðalinum.

Gospelkvøld á Jazzfestivalinum

Eins og vanligt hevur verið leingi, er hóskvøldið á Jazzfestivalinum halgað gospeltónleikinum

Stavanger Gospel Choir er høvuðsnavn á Jazzfestivalinum í kvøld

RÚNAR REISTRUP

Ein eins fastur táttur og sjálvur Jazzfestivalurin er eitt gospelkvøld á sama festivali. Ofta hevur hetta gospelkvøldið verið eitt hóskvøld og soleiðis er eisini í ár.

Í kvøld verður høvuðsnavnið á Tórshavnar jazz-, fólka- og bluesfestivali nevniliga Stavanger Gospel Choir, ið telist millum bestu gospelkór í Noregi.

Tjúgu sangarar og tónleikarar eru við kórinum, sum fyrr í ár hevur verið á konsertferð í London og Hollandi.

Kórið er kent uttan fyri Norra og á millum øðrum fleiri týskum tónleikaheimasíðum ber til at keypa fløgur hjá kórinum.

Stavanger Gospel Choir framførir í konserthøllini í Norðurlandahúsinum klokkan tíggju minuttir yvir tíggju í kvøld.

Fyrr um kvøldið verður konsertsalurin fyltur við svingandi bigbandtónum frá danska Swinging Link. Hetta er eitt lítið bigband úr Hjørring, ið millum annað eisini nýtir ljómborð til at fylla út í ljóðmyndini.

Kvøldið í kvøld byrjar annars við einari vestnorðurlendskari blanding av jazztónleikarum, ið fara at spæla løg hjá Louis Armstrong í forhøllini í Norðurlandahúsinum.

Bólkurin er mannaður við tveimum dønum, tveimum grønlendingum og tveimum íslendingum umframt av Brandi Øssurssyni, ið eisini er høvuðsfyrireikari av Jazzfestivalinum.

Hini bæði nøvnini á skránni í kvøld eru Trevor Hunter Folk Duo úr Hetlandi og Kurts Blues Band úr Ålandi.

Fyrstu tónarnir í Norðurlandahúsinum í kvøld verða blástir klokkan hálvgum átta.